# Brimil kom fram á reiðskapin hjá Thor á Føroya Banka

ÓLÓGLIG VEIÐA
*Vilmund Jacobsen*

Týsdagin kom vaktarskipið, Brimil, fram á reiðskapin hjá garnaskipinum, Thor úr Hósvík, sum stóð í syðra kanti á Føroya Banka.

Á hesi leiðini er ikki loyvt at royna við gørnum.

Á Vaktar-og Bjargingartænastuni siga teir, at talan var um tilsamans 6 svartkalvatrossar.

**Einki skip**

- Einki skip var hjá reiðskapinum, tá ið Brimil kom fram á hann, so vit settu okkum í samband við reiðaríið og skipið, og bóðu teir koma á staðið. Vit bíðaðu hjá reiðskapinum, og tá ið Thor kom, settu vit fólk umborð, meðan gørnini vórðu drigin.

Liðugt var at draga hósmorgunin, og síðan settu skipini kós móti landi.

Á Vaktar-og Bjargingartænastuni væntaðu tey gjármorgunin, at Brimil og Thor komu á Havnina hóskvøldið.

Málið verður síðan latið ákæruvaldinum, sum fer at reisa ákæru um ólógliga fiskiveiði.



*Garnaskipið, Thor úr Hósvík, er tikin fyri ólógliga garnaveiði á Føroya Banka.*

# Maskinmeistarafelagið fingið búmerki

**Seinasta fríggjadag varð vinnarin til búmerki, hjá Maskinmeistarafelagnum avdúkaður. Hetta hendi á samkomu í nýggju húsunum, við Grønlandsvegin í Havn, sum alment vórðu tikin í nýtslu henda dagin**

BÚMERKI
*Rúna Sivertsen*

Tað var 24 ára gamli, Hans Juul Nýstrøm úr Klaksvík, ið gjørdist vinnari av búmerkjakappingini, sum Maskinmeistarafelgið útskrivaði fyrr í ár.

Tá freistin at senda búmerki inn var úti, høvdu 25 fólk sent inn góð 30 uppskot.

Maskinmeistarafelagið nýtti ein listamann og ein grafikara at rágeva sær, tá dømast skuldi.

Búmerki ímyndar tvey tannhjul, ið eru skild sundur við aldum. Tað er ivaleyst upp til hugflogið hjá tí einstaka, hvat hann fær burturúr hesum búmerki.

Arbeiðsøkið hjá einum maskinmeistara fyrigongur bæði á sjógvi og landi, so ein kann hugsa sær, at Hans Juul hevur ynskt sær at samanbinda sjógv og land, tá hann teknaði.

Maskinmeistarafelagið varð stovnað, 29. apríl 1941. Nú, góð seksti ár seinni hevur felagið fingið egin hús og búmerki.




*Jógvan Nybo, formaður í maskinmeistarafelagnum, við nýggja búmerkinum hjá felagnum.*

*Mynd. Jens Kr. Vang*



*Hans Juul Nýstrøm úr Klaksvík vann kappingina um búmerki hjá maskinmeistarafelagnum. Hans Juul arbeiðir sum grafikari hjá fyritøkuni Petur&Petur í Havn*

*Mynd: Petur&Petur*



UTTAN ÚR HEIMI

# Verri útlit fyri friði í Miðeystri



*Ariel Aharon, forsætisráðharri og Shimon Peres, uttanríkisráðharri á fundi í tjóðartinginum Knesset. Tann seinni er nú farin úr stjórnini*

**Í Ísrael hevur Ariel Sharon, forsætisráðharri valt at halda fram, hóast Arbeiðaraflokkurin er farin úr stjórnarsamgonguni**

ÍSRAEL
*Árni Joensen:*

Ísraelska stjórnarsamgongan millum Likudsamgonguna og Arbeiðaraflokkin slitnaði fyrrakvøldið, eftir at partarnir ikki kundu semjast um næstu fíggjarlóg.

Tað var formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, verjumálaráðharrin Benyamin Ben-Eliezer, sum boðaði frá slitinum. Hann segði, at Arbeiðaraflokkurin hevði tikið seg úr samgonguni, tí flokkurin kundi ikki taka undir við at játta jødiskum búreisingum á Vestara Áarbakka og í Gaza-geiranum150 milliónir dollarar í stuðuli. Uppskotið hjá Arbeiðaraflokkinum var at nýta pengarnar til tey fátæku ístaðin fyri.

Avgerðin hjá Arbeiðaraflokkinum ber í sær, at Ariel Sharon, forsætisráðharri nú situr við einari minnilutastjórn, men hann boðaði beinan vegin frá, at stjórnin verður sitandi. Samstundis søgdu ráðgevar hansara, at teir høvdu fingið til uppgávu at leita stjórnini stuðul frá teimum smáu flokkunum úti á høgravonginum í tjóðartinginum Knesset.

Eygleiðarar í Ísrael siga, at tað er eitt bakkast fyri friðartilgongdina í Miðeystri, at Arbeiðaraflokkurin er farin úr stjórnarsamgonguni, og at vónirnar um frið verða uppaftur fjarari, fer Sharon at halda fram við stuðuli frá høgraflokkunum, sum ikki eru serliga hugaðir fyri friði við palestinar. Summir eygleiðarar vænta ikki, at stjórnini hjá Sharon verður langt lív lagað.

**Innanhýsis kapping**

Teir politisku eygleiðararnir vísa samstundis á, at játtanin til teir jødisku búreisingarnar var neyvan tann einasta orsøkin, til at Arbeiðaraflokkurin fór úr samgonguni.

Benyamin Ben-Eliezer er formaður í flokkinum, men kanningar í seinastuni hava víst, at hann kann vænta sær harða kapping um formansstarvið, tá flokkurin fer at velja leiðslu í næsta mánað. Serliga fyrrverandi fakfelagsformaðurin Haim Ramon og fyrrverandi generalurin Amram Mitzna kunnu hótta formanninum. Tann seinni er borgarstjóri í býnum Haifa og fær altsamt størri stuðul frá veljarunum hjá Arbeiðaraflokkinum.

Felags fyri teir báðar avbjóðararnar er, at teir eru fyri at skunda undir friðartilgongdina.

# Amerikanskir politikarar styðja Zakajev

**Tveir amerikanskir politikarar royna nú at forða fyri, at Danmark fer at lata Russlandi tann fongslaða kekenska varaforsætisráðharran**

ZAKAJEV-MÁLIÐ
*Árni Joensen:*

Zbigniew Brzezinski, sum var trygdarráðgevi hjá Jimmy Carter, forseta og generalurin Alexander Haig, sum er fyrrverandi amerikanskur uttanríkisráðharri, mæla donsku stjórnini frá at lata russum kekenska varaforsætisráðharran, Akhmed Zakajev.

Zakajev varð fyrradagin varðhaldsfongslaður í Keypmannahavn. Danska løgreglan tók hann mikunáttina, eftir at løgreglan hevði fingið upplýsingar frá russisku myndugleikunum, sum vilja vera við, at maðurin hevði samband við kekensku gíslatøkuna í Moskva. Russar vilja eisini vera við, at Akhmed Zakajev var uppi í yvirgangi í árunum frá 1996 til 1999. Hetta seinna hevur vakt ans, tí síðani 1999 hevur Zakajev verið í Russlandi meiri enn eina ferð, uttan at russisku myndugleikarnir hava tikið hann.

Teir báðir amerikansku politikararnir siga í einum brævi, sum varð handað donsku sendistovuni í Washington, at Akhmed Zakajev er ikki yvirgangsmaður, og at hann hevur avgerandi týdning fyri arbeiðið at fáa frið í Kekenia. Í brævinum siga teir eisini, at verður Zakajev flýggjaður Russlandi, kann vandi verða fyri, at allir kekenar, sum koma til Danmarkar, verða latnir Russlandi, bert tí russar siga teir vera yvirgangsmenn.

Teir báðir amerikansku politikararnir eru ikki teir einastu, sum royna at ávirka danska løgmálaráðið. Kenda enska filmskvinnan Vanessa Redgrave, sum leingi hevur verið virkin innan arbeiði fyri betri mannarættindum ymsastaðni, kom fyrradagin til Keypmannahavnar. Hon sigur seg vera sannførda um, at Akhmed Zakajev er ikki yvirgangsmaður.

## Flyta flogfør nærri Irak

Samstundis sum amerikanska stjórnin roynir at fáa eina semju í ST-trygdarráðnum um eina nýggja samtykt um Irak, er amerikanska flogvápnið farið undir at flyta bumbuflogfør nærri Irak.

Doug Raaberg, sum er oberstur í amerikanska flogvápninum, segði í gjár, at USA fer at flyta bumbuflogfør av slagnum Stealth nærri Persaflógvanum. Obersturin segði, at við at flyta flogførini úr USA til leiðina við Persaflógvan, fer tað at bera til at gera fleiri bumbuálop á Irak um samdøgrið, ger George W. Bush, forseti av at leypa á.

Sum skilst verða amerikansku flogførini flutt til bretsku flogstøðina á oynni Diego Garcia í Indiska Havinum, men nøkur teirra skulu hava støð í Fairford í Bretlandi.

## Kekenar flýggja

Viðurskiftini í Kekenia eru vernsað munandi síðani gíslatøkuna í Moskva, og nógv fólk eru seinastu vikuna flýdd úr Kekenia til grannalandið Ingosjetia.

Norsk hjálparfólk í Kekenia siga, at umleið 100.000 kekenar eru í Ingosjetia nú, og at tey liva undir sera vánaligum umstøðum. Nógv búgva í húsvognum, tokvognum ella tjøldum, og mong eru sjúk. Hjálparfólkini siga eisini, at russiski herurin hevur kringsett fleiri av flóttafólkalegunum í Ingosjetia.

Teir kekenar, sum búgva í Russlandi, hava eisini kent svíðan av gíslatøkuni í Moskva. Vesturlendskir tíðindamenn siga, at í Moskva hevur løgreglan gjørt seg inn á fleiri ósekar kekenar.

## Mítt kríggj er liðugt

Tað vakti stóran ans, tá fyrrverandi IRA-yvirmaðurin Martin McGuinness mikudagin boðaði frá, at hann er liðugur at berjast við bretar, og at hann nú heldur fer at virka fyri friði í Norðurírlandi.

Orðini hjá fyrrverandi IRA-yvirmanninum hava vakt ans, tí í Norðurírlandi hevur tað verið vanlig hugsan, at Martin McGuinness framvegis er millum fremstu talsmenninar hjá IRA. Men í einari sjónvarpssending segði McGuinness, at hann er farin burtur úr IRA.

Martin McGuinness var kenslumálaráðharri í norðurírsku savingarstjórnini, til bretska stjórnin koyrdi stjórnina frá herfyrri.

## Leita eftir neyðtøkumanni

Bretska løgreglan hevur sent umleið 100 løgreglufólk at leita eftir einum manni, sum er skuldsettur fyri at hava neyðtikið tíggju gentur og kvinnur í landssynningspartinum av Ongland.

Løgreglan sigur, at maðurin er millum 30 og 50 ára gamal. Yngsta gentan, sum hann hevur neyðtikið, var einans tíggju ára gomul, og tann elsta kvinnan, sum maðurin hevur gjørt seg inn á, var 52 ár. Sambært løgregluni var tann fyrsta neyðtøkan í november í fjør. Tað seinasta higartil var seinasta fríggjadag.

Løgreglan í Kent sigur, at neyðtøkumaðurin er vandamikil. Hann er ógvusligur og er vápnaður við knívi.

Løgreglan hevur fingið ein hóp av fráboðanum frá fólki, sum halda seg vita, hvør neyðtøkumaðurin er, men enn er eingin tikin.